Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 13**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um umsókn frá Pól Joensen og Hannu Kampmann um loyvi til at keypa lendi burturav matr. nr. 266k til bilhús.
J.nr. 2009-287

Nevndin mælir til at selja umsøkjarunum ein 8 m breiðan geira burtur av matr. nr. 266k fyri 100 kr/fermeturin. Harafturat skulu tey gjalda fyri avtøku av vetrarbiti og matrikulering av lendinum.

**Viðv. 13**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 14**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um umsókn um stuðul frá KFUM-skótunum í Kvívík.
Skótarnir søkja um stuðul, tí teir hava keypt nýtt skótahús í Kvívík.
J.nr. 2009-134

Nevndin mælir frá at ganga umsóknini á møti.

**Viðv. 14**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 15**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um umsókn um stuðul frá bátastevnunevndini.
Bátastevnunevndin søkir um 25.000 kr. í stuðli.
J.nr. 2009-256

Nevndin mælir til at stuðla Bátastevnuni 2011 við 20.000 kr.

**Viðv. 15**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 16**
Tilmæli frá Trivnaðar- og umhvørvisnevndini um val av limi til kirkjugarðsnevndina fyri Johannus Bjørgvin.
J.nr. 2009-002

Nevndin mælir til at velja Sveinbjørn Poulsen, Heygatún 13, Vestmanna, til lim í kirkjugarðsnevndina.

**Viðv. 16**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 17**
Tilmæli frá Trivnaðar- og umhvørvisnevndini um Ung í arbeiði.

Nevndin mælir til at geva næmingunum úr Vestmanna í 9. flokki í Vestmanna Skúla tilboð um arbeiði í eina viku í part. Víst verður til upprit frá umsitingini, dagf. 18. mai 2010.

**Viðv. 17**
Tilmælið einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.15.

Sign.:

Karl A. Olsen Herit Magnussen Pauli T. Petersen Jón Mikkelsen

Evelyn Gaard Siri S. Niclassen Bárður Poulsen